Dimmalætting

Amtstidende for Færøerne

Kr. 2,00

NR. 78. TORSDAG 26. AUGUST 1976. 99. AARGANG.

Ein sápubløðra

JÚKAÐ hevur verið upp í saman her heima á landi, at nýtslan av eitrandi drekka fyrst og fremst stavar frá, at vit hava eina avoldaða brennivínsskipan, har einki er loyvt og skipanin tí verður brotin og tostin eftir rúsandi drekka av somu grund størri enn aðrastaðir.

Víst hevur verið til, at í Danmark til dømis sært tú bert undantaksvíst ein fullan mann, meðan tað er rættiliga vanlig gerandismynd her á landi at síggja drukkið fólk, eina helst unglingar av báðum kynum. Tað er almenna formyndaraskipanin, sum skuldina hevur, siga mong, ikki minst tey, sum sjálvi drekka sterkt til yvirmál.

Hyggið bara eftir Danmark! Har hevur yvirhovur ongantíð verið skerjing av brennivínssølu! Har hevur verið løgligt, at eitt barn fer í næsta handilin at keypa sterkt ol ella brennivín til foreldur síni, og hagtol vísa, at nýtslan av brennivíni er upp á seg minni enn í Finlandi, Svøríki og Noreg, har áður hevur verið skerjing av brennivínssølu og partvíst er enn.

Men nú um dagarnar segði danski innanríkisráðharrin, Egon Jensen, at yvirnýtslan av sterkum løgi er vorðin so stór, at hetta ikki kann ganga longur; spurningurin er bara um, hvatið gerast kann fyri at forða fyri, at henda ovurnýtsla kann verða stødgað! Tað, sum órógvar Danmark er, at tað fyrst og fremst er tað unga fólkið, sum eftir at hava kvittað við hash og annað narkotika, er fallið til fløskuna istaðin. Okkurt má gerast, heldur innanríkisráðharran, men hvat?

Spurningurin stendur opin, og hóast innanríkisráðharrin danski heldur, at skerdir moguleikar fyri at keypa rúsdrekka allarhelst bert vil føra til at hugurin til at drekka økist, so loysir tað ikki problemið hjá honum hetta, at drykkiskapurin tekur yvirhond í so stórt mát, at hann ógvast, hóast at Danmark sum er hevur so fría sølu av sterkum drekka, sum nakar, og rúsingin viða um í landinum, helst millum tey ungu, økist í hvørjum, so at hann ógvast.

Trupulleikar Egon Jensens munnu helst enda í, at sett verður ein sernevnd av m. a. psykologum (sálarfrøðingum), sum eina ferð í næstu framtíð koma fram við einum áliti viðviðkjandi spurninginum. Hvørið enn úrskurðurin frá eini slíkari nevnd verður, duga vit ikki at meta um enn; men allarhelst man henda nevnd koma til tað úrslit, um hon verður sett, at »vælferðarheimið«, har tey ungu fáa upp í hondina alt,ið teimum tørvar, tekur fíggjarligu trupulleikarnar frá teimum og ger tey fór fyri uttanfyri útbúgvingartíðina at taka sær okkurt fyri við peninginum, sum lækandi kemur til teirra, og tí falla til fløskuna, at stytta sær stundir við.

Men hetta, at fólk læra at haga sær fyri rúsdrekka, tá ið tey kunnu keypa sær tað uttan hindur, er ein sápubløðra. Danski innanríkisráðharrin váttar ókravt, at har á landi verður drukkið meira enn til ovurmát, tekur burtur allar stuðlar undir, at føroyska brennivínsskipanin, sum er mótsett tí donsku, ber skuldina fyri, at her á landi verður drukkið ovnógv, fyrst og fremst av teimum ungu. Tað er hjá okkum tíðin, sum ger tað, ein tíð við ovmikið av peningi um hendur, sum ilt er at sleppa av við uttan at fara til tað lættasta av løttum, at keypa brennivín fyri.

Tað skulu sterkir herðar til at bera góðar dagar, sigur orðatakið. Tað er so satt, sum tað er sagt.

Bergholið í Eysturoy opnað

Næstan komnir í hæddina við vegasambandinum, sigur landsverkfrøðingurin

Týsdagin varð bergholið í Eysturoy opnað fyri almennari ferðslu. Við eitt hátíðarhald, sum fór fram við eystara tunnilmunnan, kvetti Atli Dam løgmaður snórin, sum var spentur tvørtur um vegin Funningsfjarðamegin og knýtti harvið saman vegakervini í Eysturoy og Streymoy.

Nógv fólk var samankomið til hátíðarhaldið, har hornorkestrið í Runavík undir leiðslu av Simuni Nónklett spældi. Røður vórðu hildnar av Mikkjali Helmsdal landsverkfrøðingi, D. P. Danielsen landsstýrismanni og Atla Dam løgmanni.

Landsverkfrøðingurin segði m.a., at vit í dag við opningini av hesum bergholi næstan eru komnir í hæddina við vegasambandinum, og at tað, sum hereftir verður gjørt mestsum verða ábøtur.

Aftan á sjálva opningina av bergholinum bjóðaði landsstýrið arbeiðsmonnum og ollum, sum hava havt við bergholið og vegagerðina báðumegin at gera, saman við m.a., umboðum fyri bløðini, løgtingsmonnum o.ø. til døgurða á ALV-skúlanum við Áir, har nógvar røður vórðu hildnar við góðyntskjum fyri hetta megnar samferðslutiltak, sum nú var gjørt liðugt.

Longsta berghol í Føroyum

Av teimum 6 ferðslubergholunum í Føroyum — 2 í Suðuroy, 2 á Borðoy og 1 í Streymoy — er Eysturoyarbergholið við sínum 2500 metrum tad longsta.

Kostnaðurin saman við 3,8 km av veg frá brúnni um Streym niðan til bergholsmunnan vestanfyri og 1,5 km av veg úr Fjarðavegnum niðan til bergholið eystanfyri liggur um 40 mill. kr.

Bergholið er 9 metrar breitt og 6,35 metrar høgt við tveimum koyribreytum, sum eru stoyptar. Eingin gongu breyt og einki ljós er í bergholinum, sum er so beint, at tað sæst úr munna í munna.

Tað seyrar ikki nógv vatn niður úr bergholsloftinum, men har tað rennur eitt sindur, er loftið fóðrað við plátum. Renna er báðumegin koyribreytirnar, og rennur vatnið eystureftir gjøgnum bergholið, sum hevur hall móti Funningsfirði. Bergholsmunnin uppi yvir Norðskála er 192 metrar yvir havinum, og uppi yvir Funningsbotni er hann 135 metrar, soleiðis at hallið er 23 promille.

200 tons av dynamitti

Meðan landið sjálvt hevur staðið fyri arbeiðinum av vegunum báðumegin bergholið, hevur byggifelagið Píhl & Søn staðið fyri sjálvum bergholsarbeiðinum. Píhl & Søn hevur eisini gjørt oll hini bergholini í Føroyum.

Sten Balle verkfrøðingur upplýsti, at farið varð undir arbeiðið uppá bergholið í Eysturoy 8. oktober 1973. Fyrsta spreingingin varð 23. januar 1974, og komið var hálva leið 25. oktober sama ár. 4. juli í fjør varð seinasta skotið loyst av, sum opnaði bergholið uppi yvir Norðskála.

Arbeitt hevur bert verið eystaru megin frá. Tað eru boraðir 250.000 borimetrar og gjørdar 780 spreingingar. Ein hálv millión tons av grøti er komið út úr bergholinum.

200 tons av dynamitti eru farin til at spreingja bergholið gjøgnum, og nýttar eru 70.000 spreingiperlur.

Til koyribreytina eru farnir 4000 kubikkmetrar av betong, og brúktir eru 30.000 sekkir av sementi.

Atli Dam løgmaður klippir reyð-blá-hvita snórin og knýtir harvið formliga saman vegakervini í Eysturoy og Streymoy

Bergholsopið eystaru megin

Hestur yvirkoyrdur

Í fyrradagin varð ein hestur yvirkoyrdur á Oyggjarvegnum uppi við Kleynsvarða norðan fyri Havnina. Tað var ein bilur, sum kom norðureftir, í koyrdi á hestin, sum doyði. Tá ið maðurin hevði vent bilinum, hevði ein annar bilur, sum kom suðureftir, eisini koyrt á hestin.

Eingin fólkaskaði hendi, men bilarnir fingu nakað av skaða.

Stutt síðan varð ein annar hestur yvirkoyrdur. Tað var við brinna í Leynum, hetta óhappið hendi, og eisini tann hesturin doyði.

Planer om nordisk atomkraftværk

HELSINGFORS, (AP)

Planerne om et fællesnordisk atomkraftværk skal drøftes mellem de respektive nordiske lande.

Paa industriministrenes møde i Helsingfors tirsdag kunne dog hverken Danmarks eller Islands ministre møde op, hvorfor de øvrige kolleger enstemmigt besluttede at indkalde til en egentlig nordisk principdiskussion til november.

Men Norges, Sveriges og Finlands industriministre naaede ogsaa at drøfte muligheden af et egentligt regeringsudspil paa baggrund af den kendsgerning, at et britisk glasværk har etableret sig stærkt i Norden og i det sidste par aar har skærpet konkurrencen med lavpriser.

Undtagelsestilstand i Irland?

Paa grund af IRA-undergrundsbevægelsens stadig forøgede virksomhed

DUBLIN, (AP)

Den irske regering har besluttet at anmode om politisk støtte til indførelse af undtagelsestilstand med suspension af forfatningen i et forsøg paa at effektivisere kampen mod undergrundshæren IRA, meddeles det i gaar i Dublin.

Denne anmodning til parlamentet er uden sidestykke i republikkens historie, men ikke desto mindre ventes undtagelsestilstanden vedtaget, idet regeringen har solidt flertal i begge kamre.

Det fremlagte lovforslag ændeholder blandt andet tilladelse for politiet til at arrestere og tilbageholde mistænkte personer i syv dage mod hidtil højst i 48 timer.

Parlamentet er indkaldt til hastemøde den 31. august for at tage stilling til regeringens anmodning som tillige indebærer forslag om en meget væsentlig skærpelse af strafferammen i den irske republik.

I Dublin næres der ikke tvivl om, at regeringens krigserklæring overfor IRA-undergrundsbevægelsen er provoceret af drabet paa den britiske ambassadør Christopher Ewart-Biggs for godt en maaned siden.

Regeringen har ikke afsløret, hvorlænge den ønsker undtagelsestilstanden opretholdt.

Íslendska hvalakvotan skjótt uppfiskað

Teir 4 íslendsku hvalabátarnir, sum skjóta stórhval til stoðina á Hvaltjørðinum, hevdu seinasta vikuskiftið skotið tilsamans 298 hvalir. Um sama tíð í fjør var veiðan hjá sama bátum 330 hvalir.

Kvotan, sum íslendingar fingu av finnhvali í ár, er skjótt uppfiskað. Teimum varð lutað at kunna skjóta 275 finnhvalir, og til seinasta leygardag vóru komnir 266 inn til stoðina á Hvaltjørðinum.

Av spermi hevdu bátarnir skotið 29, meðan teir í ár bert hevdu skotið 3 sildrekar.

Hvalaveiðan heldur á til uml. halvan september.

Leikfelag Reykjavikur á vitjan:

Fyrstaframførsla í Sjónleikarhúsinum í kvøld

Íslendsku sjónleikararnir sýna leikin SKJALDHAMRAR eftir Jónas Árnason, sama hevunda ið skrivaði leikin »Jørundur Hundadagakongur«

Umframt í kvøld verður leikurin sýndur í annaðkvøld og leygarkvøldið

Í ár hevur Havnar Sjónleikarfelag havt fleiri vitjanir av útlendskum sjónleikabólkum, ið allir hava sýnt áhugaverdar leikir á pallinum í Sjónleikarhúsinum í Havn. Allar hesar fremmandavitjanir í ár hava verið í samband við at Havnar Sjónleikarfelag hevur 50 ár á baki. Fyrstu ferð ið felagið sýndi leik var 10. desember 1926. Teir, ið vitjað hava hendan vegin er bólkur frá Tjóðleikhúsinum í Reykjavik, ið vitjaði í vár, seinni komu so leikarar frá Lilla Teater úr Helsinki, Aarhus Teater og so nú í hesum dogum leikarar frá Leikfelag hevur 50 ár á baki. Fyrstu vitjan eisini skuldi verða úr Svøriki, men teimum barst tíverri frá.

Á stuttum blaðmannafundi í fyrrakvøldið segði formaður Havnar Sjónleikarfelags Oskar Hermanson, at ikki var tað av tilvild at seinasta vitjanin teir fingu, varð frá Leikfelag Reykjavikur. Í mong ár hevur fruktagott samarbeiði verið felaganna imillum. Tað byrjaði við, at leikkonan Erna Sigurleifsdóttir í 50'unum stjórnaði leikinum »Mýs og menn« og »Topaz«. Í 1964 vitjaðu leikarar úr Leikfelagnum við »Hart í bak« eftir Jøkull Jakobsson, og tað er við serligari gleði vit nú aftur hava leikarar úr Leikfelag Reykjavikur sum gestir okkara.

Høvundurin Jónas Árnason



Leikstjórin Jón Sigurbjørnsson

Vigdis Finnbogadóttir, leikhústjóri

Leikurin vit skulu siggja

Flestu sjónleikaáhugaðum man standa friskt í minni sjónleikin »Hundadagakongur«, eftir Jónas Árnasson, sum Sjónleikarfelagið framfórdi fyri fáum árum síðan. Hetta mundi vera hinar best vitjaðu sýningar, ið nakrantíð hava verið í Sjónleikarhúsinum.

Leikurin »Skjaldhamrar«, ið vit nú skulu siggja, eftir sama høvunda, hevur í seinasta leikári verið sýndur 85 ferðir í Reykjavik og skal takast uppaftur komandi vetur.

Gongdin í leikinum, sum fer fram í Islandi undir seinna heimsbardaga, er í stuttum henda:

Loyniløgreglan hjá Þretska hervaldinum hevur fingið frænir um, at tyskur njósnari er settur á land í Islandi. Úr Bretlandi kemur serfrøðingur í slíkum málum til Islands at hjálpa til at finna fram til njósnaran, og visir hesin serfrøðingur seg at vera kvinnuligi loytnanturin Stanton. Saman við nøkrum hermonnum og einum korporáli, sum dugir islendskt, fer hon vestur til Skjaldhamrar, har vitapassarin Kormákur Torfason býr einsamallur saman við systur sini. Her um leið skal njósnarin vera settur í land.

Tað er hann eisini. Ungur íslendingur, Páll Daniel Nielsen, sum omman hevði sent til Týsklands at læra at roykja síld, slapp ikki heim, áðrenn kriggið brast á; fyri at sleppa heimaftur til ommuna hevur hann verið á njósnaraskeiði og verður settur í land av kavbáti, men á rongum stað — tvey pláss í Islandi eita Skjaldhamrar, og á báðum er viti, men hetta er skeiva plássið.

Tá ið bretsku hermenninir koma til Skjaldhamrar, tekur vitapassarin synd í Palli Daniel og gongur við til at krógva hann niðri í kjallaranum hjá kunni.

Leikurin snýr seg nú um uppklæringina av njósnaramálinum, og undir hesum arbeiði kemur tað til kærleika millum Katrin Stanton loytnant og Kormák Torfasson vitapassara, eins og tað eisini rennur saman millum korporálin og systir Kormáks. Hóast loytnanturin skjótt kemur eftir, at Páll Daniel er goymdur í kjallaranum, er hon ikki áhugað at fáa málið uppklárað ov skjótt, sjálvt um bretsku yvirmenninir í Reykjavik gerast ótolnir og vilja hava tað loyst, áðrenn amerikanararnir skulu avloysa bretar við hersetingini av Islandi.

Leikurin endar við, at mitt meðan loytnanturin, njósnarin og vitapassarin hjálpa kunni at kálva, kemur ovastin fyri loyniløgregluni saman við nøkrum amerikanskum hermonnum inn í kjallaran...

Maðurin, ið stjórnað hevur leikin, er Jón Sigurbjørnsson, sjálvur kendur og heppin leikari.

Leiðari av ferðini hígar er Vigdis Finnbogadóttir, leikhústjóri. Hon sigur at Leikfelag Reykjavikur kennir seg heiðrað at verða boðið hígar at markera fimtiárið hjá Havnar Sjónleikarfelag.



Hjalti Rögnvaldsson (korporálur) og Karl Guðmundsson sum majorur

Þorsteinur Gunnarsson leikar vitapassarin Kormákur og Helga Backmann leikar Katrin Stanton, loytnantur